Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Tórsvøllur royndur av álvara

*Oddagrein*

TÓRSVØLLUR stóð sína fyrstu veruligu roynd, tá føroyska landsliðið í fótbólti tók ímóti tí danska mikukvøldið. Áhugin var stórur. Øll atgongumerkini vórðu seld, og hóast eini 6000 fólk vóru í Gundadali hetta kvøldið, gekk alt væl. Bæði Fótbóltssambandið og Tórsvøllur megnaðu sína uppgávu til fulnar.

MIKUKVØLDIÐ prógvaði, at tað er rætt, at vit hava eitt veruligt landsstadion í høvuðsstaðnum, og at teir týðandi dystirnir verða spældir har. Tað skerst ikki burtur, at í høvuðsstaðnum er besti møguleikin at fáa so nógv fólk til dystir. Nú var áhugin fyri hesum dystinum serstakliga stórur, og nógv høvdu óivað farið inn á Svangaskarð, men neyvan hevði borið til at fáa so nógvar áskoðarar.

B68 tók eitt djarvt sig, og skjótir vóru teir í vendingini, tá toftamenn fingu í lag at gera fótbóltsstadion við grasvølli á Svangaskarði. Hesin vøllurin hevur havt stóran týdning og hevur verið við til at menna landsliðsfótbóltin í Føroyum. Vit kunnu kanska siga, at tað var gott, at havnarmenn vóru eitt sindur seinir í vendingini tá. Høvdu vit ikki fingið eitt fótbóltsstadion á Svangaskarði tá, og eitt varð gjørt í Havnini, høvdu vit neyvan fingið nakað annað í bræði. Og neyðugt og gott er at hava tveir grasvøllir, tá kappingar ella stevnur við fleiri liðum verða fyriskipaðar.

TÓKU toftamenn og kanska eysturoyingar dyggiliga undir við ætlanini á Svangaskarði tá fyrst í 90-unum, so kann ikki sigast annað enn, at havnarmenn hava tikið dyggiliga undir við Tórsvølli. Tá hann varð gjørdur í fjør, varð eitt stórt sjálvboðið arbeiði gjørt, og eisini seinni hava fólk tikið eina hond í.

HÓAST alt verður meira og meira professionelt og goldið verður fyri alt, er kortini gott, at nakað av tí gamla er eftir í Føroyum – tað at taka eina hond í, hjálpa til, uttan júst at fáa nakað aftur fyri, men bara kunna gleðast við at hava hjálpt til. Ofta verður sagt, at tey ungu fáa bara alt í dag. Tey gera einki sjálvi fyri at fáa nakað. Hetta er kanska ikki heilt rætt, tí tey royna eisini, tá tey fáa høvi. Men í sambandi við Tórsvøll hava tað helst verið meiri pápar og abbar, sum hava tikið eina hond í.

TÁ hetta er sagt, so skal kortini viðmerkjast, at vónandi fær Tórsvøllur borið tað soleiðis í bandi, at útsjóndin – serliga omaneftir og vestureftir – verður fríðkað. Í dag er áskoðarapallurin einki prýði fyri Gundadal. Tvørturímóti. Tað at fara at hugsa um, hvussu útsjóndin kann betrast aftaná, er tann øvugta gongd. Men tað er gjørt so nógv øvugt í hesum máli, at hetta mugu vit taka við eisini. Fóru menn ikki til verka tá, høvdu vit ikki nakað fótbóltsstadion í dag. Bara spell, at rennibreytin ikki varð løgd rundan um vøllin. Men sum fótbóltsvøllur hevur hann av álvara staðið sína roynd!

***Sosialurin***

# Ikki bara tey arbeiðsleysu rýmdu

*Í bók síni er Erik Arge komin fram til, at tað ikki bara vóru tey arbeiðsleysu, sum rýmdu av landinum undan kreppuni*

STEFAN Í SKORINI

Erik Arge, lærari á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali, hevur júst givið út bók, sum viðgerð búskaparkreppuna og fráflytingina, sum stóðst av henni. Eisini verður í bókini komið inn á, hvussu kreppan rakti føroyingin, og hvussu lívskorini broyttust av hesum.

**Flest fluttu fyri at fara í útbúgving**

Ein útisetakanning var gjørd, og hon verður brúkt sum støði undir einum stórum parti av bókini. Tey spurdu eru føroyingar í Danmark, sum fluttu í 1991 og í 1994, og tað er Fróðskaparsetur Føroya, Hagstova Føroya og Danmarks Statistik, ið hava skipað fyri hesi kanningini í 1996.

Í hesi kanningini sigur meira enn helmingurin av teimum spurdu, at orsøkin, til at tey fluttu til Danmarkar, var at fáa sær eina útbúgving. Serliga er tað aldursbólkurin frá 20-30 ár, sum flutti úr Føroyum vegna útbúgving. Vert er at hava í huga í hesum sambandi, at hesin aldursbólkurin ikki hevði teir stóru møguleikarnar í Føroyum, sjálvt um orsøkin til at tey fluttu úr Føroyum kanska ikki beinleiðis var arbeiðsloysi.

17% av teimum spurdu søgdu seg flyta til Danmarkar, av tí at ein, sum tey høvdu tætt tilknýti til, flutti av landinum, meðan onnur 17% søgdu seg flyta til Danmarkar fyri at fáa arbeiði.

Vert er at leggja merki til, at færri enn 1 % av teimum spurdu søgdu seg flyta úr Føroyum undan ov stórari persónligari skuld. Hetta setir rithøvundurin tó spurnartekin við, tí at tað óivað vóru fleiri, sum rýmdu undan stórari persónligari skuld, men vilja ikki viðganga tað ella hava valt ikki at svara spurnarblaðnum.

Út frá hesi kanningini ber til at siga, at tey, sum rýmdu av landinum, ikki bara fóru vegna arbeiðsloysi, men at enn fleiri søgdu orsøkina vera útbúgvingarmøguleikar.

Útisetakanningin vísir eisini útbúgvingarstøðuna hjá føroyingunum. Aftur her er myndin greið, tí 35% eru í holt við eina útbúgving í Danmark, og hetta talið veksur frá 1991 til 1994. 27% hava eina hálvlanga ella millumútbúgving, meðan 19% als onga útbúgving hava.

Í 1991 høvdu 65% av teimum, sum rýmdu, arbeiði eitt hálvt ár áðrenn tey fluttu. Í 1994 er hetta talið minka niður í eini 50%.

**Serliga tey ungu rýmdu**

Tað er ikki nakað nýtt, at tað serliga vóru tey ungu, sum fluttu av landinum, og tað eru fleiri orsøkir til tað. Fyri tað fyrsta rýmdu tey flestu, tí tey fóru í útbúgving, og tí er tað ikki so løgið, at tey flestu vóru ung, sum fluttu.

Eisini ber til at finna aðrar orsøkir til at serliga tann yngri aldursbólkurin rýmdi, tí á einum arbeiðsplássi er tað ofta skipað soleiðis, at tey, sum seinast eru sett í starv, eisini eru tey fyrstu at verða uppsøgd, tá ið niðurskurðir verða gjørdir á arbeiðsplássinum. Fleiri ung, sum júst høvdu bygt hús, hava havt torført við at gjalda lánini aftur, tá lønirnar lækkaðu munandi.

Kanningin vísir eisini, at í 1991 vóru 40% av útisetunum í Danmark í aldrinum 25-29 ár, og hetta vísir greitt mynstrið, at serliga tey ungu rýmdu.

**Bústaðarmynstrið**

Størsti parturin av føroyingunum búsettu seg í Jútlandi. Umleið helmingurin valdi at búseta seg í Jútlandi, og tey flestu fóru til Vesturjútland, har 17% valdu at seta búgv. 13% fóru til Norðurjútland, og tað sama til Eysturjútland, meðan bara eini 4% valdu at flyta til Suðurjútland.

Frá 1991 til 1994 vaks talið av føroyingum, sum fóru til Vesturjútlands, og orsøkin til tað er, at í 1994 er fiskivinnan verri rakt av kreppuni enn í 1991, og føroyingar, sum áður hava verið í arbeiði í hesi vinnuni, flyta til Vesturjútland og halda fram í somu vinnu. Nógv eldri fólk flyta til Norður- og Vesturjútlands.

Ein triðingur flutti til Keypmannahavnar. Serliga eru tað tey ungu, sum leita sær til høvuðsstaðin, tí at har eru bestu útbúgvingarmøguleikarnir at finna. Eisini hevur Keypmannahavn flest tilboð at bjóða, og tað dregur ung fólk.

22% siga seg ikki vilja flyta heimaftur til Føroyar, meðan onnur 30% ætla at flyta heim, um tey fáa ein hóskandi arbeiði. 13% bíða til umstøðurnar eru batnaðar, meðan 19% bíða til útbúgvingin er lokin.

# Fyrsti skúladagur verður mánadagin

*Av teimum 7400 børnunum, sum fara í skúla mánadagin, fara 732 av teimum í skúla fyri fyrstu ferð, og í hesum sambandi skipar Ráðið Fyri Ferðslutrygd fyri ymiskum tiltøkum*

STEFAN Í SKORINI

Eitt av afturvendandi tiltøkunum hjá Ferðslutrygd hevur verið at givið børnunum keppar, sum er reyðir, gulir og grønir. Hetta verður aftur gjørt í ár, og tað er Mjólkarvirkið, sum letur húgvurnar. Hetta verður gjørt fyri at bilførarar skulu kenna børnini aftur.

Ferðslutrygd letur eisini foreldrum at børnum í fyrsta flokki ein faldara, sum skal hjálpa foreldrunum at vegleiða børnini í ferðsluni.

Í sjónvarpinum verða lýsingar sendar, sum skal minna bilførarar á børnini, sum nú fyri fyrstu ferð skulu royna seg á egnum beinum í ferðsluni.

Jón Kragesteen heldur tað vera umráðandi at vísa á fyrsta floks børnini, tí tey ongar royndir hava í ferðsluni, nú tey skulu í skúla.

Ferðslutrygd hevur í tí sambandi kannað munin millum at koyra 30 og 50 km/t. Tá ið koyrt verður 30 km/t er møguligt at steðga fyri einum barni, sum er 13 metrar burturfrá, men um koyrt verður 50 km/t rennir tú á barnið uttan at hava nomið við bremsuna.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum við vitjan, telefonsamrøðum, gávum og telegrammum gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 25. juli.

**Thomas Wilhelm, Tórshavn**



# Norsk Hydro takkar fyri seg í Føroyum

*Skrivstovan letur aftur, tí oljufelagið slapp ikki upp í part, og stjórin Geir Atle Rishovd fer aftur til Noregs*

DIA MIDJORD



*Stjórin hjá Norsk Hydro í Føroyum, Geir Atle Rishovd, vinstrumegin, takkar aðalstjóranum í Oljumálastýrinum Herálvi Joensen fyri gott samstarv og ynskir føroyingum góða eydnu víðari*

Geir Atle Rishovd, stjóri hjá Norsk Hydro í Føroyum, er so smátt farin at rigga av. Um stutta tíð steingir skrivstovan á Bryggjubakka, og norðmaðurin fer aftur til Noregs, har aðrar uppgávur hjá oljufelagnum liggja og bíða.

– Eitt sindur keðiligt, at vit ikki sleppa at skriva restina av søguni. Men vit kenna tað soleiðis, at vit hava verið við í teimum innleiðani kapitlunum, sigur Geir Atle Rishovd.

Hann vísir til, at Hydro hevur m.a. gjørt eitt yvirlit av føroyskum veitarum í sambandi við oljuvinnuna, og Hydro/Saga hevur eisini havt føroyingar til upplæring í felagnum.

– Eg vóni, at okkara íkast hevur ført til, at føroyska vinnulívið er lyft eitt sindur uppfrá, sigur Geir Atle.

**Skuffaður**

Tað er við sorgblídni, at fryntligi og fyrikomandi norðmaðurin takkar fyri seg, tí hann hevur verið í Føroyum hálvttriðja ár. Fyrst sum leiðari á skrivstovuni hjá Saga Petroleum og seinastu tíðina, sum leiðari hjá Norsk Hydro.

– Soleiðis eru nú einaferð treytirnar í oljuverðini, og tað kanst tú ikki gera nakað við. Men eg komi at sakna Føroyar og føroyingin og ætli mær avgjørt at viðlíkahalda góða sambandi, sigur norðmaðurin, ið fer heim um nakrar vikur.

– Eg ivist onga løtuna, at eg fari at fáa framhaldandi áhugaverdar og spennandi uppgávur í Norsk Hydro.

**Rósar føroyingum**

Áðrenn Geir Atle Rishovd steingir og sløkkir, ætlar hann sær inn á gólvið hjá Oljumálastýrinum. Oljumálaráðharrin hevur nevniliga boðið teimum oljufeløgum, ið ikki sluppu upp í part, at fáa eina eftirmeting av umsóknini.

– Vit fegnast um henda møguleika og taka av tilboðnum. Tað er altíð gott og sunt at fáa eina eftirmeting, tí kanska er okkurt, vit kunnu læra av í framtíðini, sigur Geir Atle Rishovd.

Stjórin hjá Norsk Hydro í Føroyum rósar eins og flest onnur eisini arbeiðnum hjá Oljumálastýrinum.

– Talan er um eina optimala loysn av umráðnum, sum varð bjóðað út, sigur hann.

# Eingin avgerð tikin

*Jóhan Mac Donald, stjóri hjá Texaco í Føroyum, veit ikki enn, hvør næsti leikur verður*

Óvissað valdar eisini um skrivstovuna hjá oljufelagnum Texaco í Havn, har trý fólk starvast.

Jóhan Mac Donald, stjóri, veit ikki rættiliga at siga, um skrivstovan letur aftur í næstum. Hann hevur enn eingi boð fingið hesum viðvíkjandi frá høvuðsskrivstovuni í London.

– Tað virkar eitt sindur løgið at hava eina skrivstovu her, tá vit ikki eru slopnir upp í part. Men boðini eru so ikki komin enn, sigur hann.

– Sjálvandi eru vit skuffaði, tí vit mettu, at vit lótu inn eina góða umsókn, sigur stjórin hjá Texaco í Føroyum, Jóhan Mac Donald.

## Umhvørvið í tryggum hondum

Sambært faldaranum, ið lýsir GEM-verkætlanina higartil, koma teir fýra arbeiðsbólkarnir - innan jarðtøkni, umhvørvi, metocean og tilbúgving - á mál fyrst í komandi ári. Henda verkætlan skal tryggja oljufeløgunum neyvar og álítandi umhvørvisupplýsingar í sambandi við oljuvirksemi á sjónum.

## Alment kjak um umbygging

Løgtingsmenninir Páll á Reynatúgvu og Jenis av Rana heita á formansskapin at skipa fyri almennari kunning í sambandi við umbyggingina av løgtingshúsinum. Slíkt kjak kundi ført við sær natúrligar broytingar, ið allir føroyingar høvdu fegnast um, siga teir báðir í skrivi til formansskapin.

## Meira verður ikki gjørt við Signar

*Hóskvøldið var endalig viðgerð av málinum um Signar á Brúnni, og flokkurin hevur nú lagt málið aftur um bak*





DIA MIDJORD

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum sigur, at málið um Signar á Brúnni hevur verið trupult, men at tað eftir fundin hóskvøldið er lagt aftur um bak.

– Nú hava vit fingið tosað út um tingini, hvørjar mannagongdirnar hava verið, og hvussu vit skulu fyrihalda okkum í framtíðini. Tað hevur verið flokkinum at gagni, at hetta nú er fingið frá hondini, sigur Høgni Hoydal.

Bæði tingmanning og landsstýrismanning vóru til staðar hóskvøldið, tá málið bleiv viðgjørt.

